Fra: S H <tequila505@hotmail.com>
Sendt: hósdagur, 28. mars 2024 14:05
Til: Poula Árnadóttir Lervig <poulal@logting.fo>; mariam@bumrbumr.fo
Emne: Viðmerkingar til LM-082/2023

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bvt (bvlóg) (Fráboðan um børn við bústaði í Danmark, stuðul til foreldramyndugleikan, heimild til bvn at taka avgerð um ávís viðurskifti hjá barninum og heimild at flyta bvmál millum bvt).

Fyri hægsta mynduleika í Føroyum tók tað, í mun til onnur mál, umleið 1 tíma at tosa um skipan. Takk, at tað á tingsins røðarapalli er spurt eftir brúkaraumboð: "hvar er tann røddin, hava vit lurta eftir teimum?" Um metingin enn er, at tað er als ikki lurta eftir brúkara, burdi spurningurin møguliga verið: "hvar skal brúkari venda sær, um tað ikki er lurta politiskt?" Er tað lati upp fyri, at brúkari verður hoyrdur? Hava brúkarir fingið skrivliga tileggjan, at svara viðmerkingum? Ella er tað einans lagt upp og út til skipan sjálva, at svara og har summi av hesum hava valt at takka nei ella ignorera ummælisskriv? Tað er møguligt, at leggja upp til, at spyrja brúkara, nú skipanin er boðin at koma við viðmerkingum. At senda umbøn til allir brúkarir í skipan. Møðuliga tey flestu fara ikki at svara, men takið tað til eftirtektar, sum brúkari sigur, um hesi tiltøk í hesum uppskotið muna. Harmiligt, at øll brúkarafeløg í skipan ikki vera umboða og fáa ummælisskjal sendandi. Síggi á listanum yvir teldupostar, at har kundu saktans verið fleiri tilknýtt, tí hesi hava verið meira aktiv fyri brúkarin enn nakað navn á lista.

Ummælisskriv er sent hesum ymisku hoyringspørtum kl 17.30, 10. januar. Freistin at senda inn er 31. januar. Hetta er ikki sent til Familjuhjálpina, sum allíkavæl velja at svara. Harmiligt, at fakbólkurin 120 ella hjásitar sum heild, ikki eru spurd. 120 er brúkarabólkur fyri fakfólk, sum brúka okkara skerpaðu fráboðanarskyldu, til skipan um skipan, fyri at fáa betri korð fyri brúkarir, herundir bæði barnafamiljur og fakfólk. Søgan hevði verið ørvísi, um stuðlar, mentorar, leiðbeinarir, Familjuhjálpin, Verjið Børnini Móti Barnaverndini og brúkarir yvirhøvur vóru spurd um uppliving av fundum við bvt. Hevur nakar brúkari valt at takka nei? Er tað mett sum samtarvsinna skipan, sum ikki spyrja brúkara hvussu væl skipanin riggar og hvussu góð hjálpin er, sum familjur eru fastlæst í? Tað burdu komi fleiri lógarrættingar enn hesar, men hetta er ein byrjan.

§14 stk 4 verður fyri tað fyrsta ikki yvirhildin og fyri tað næsta er tað alt ov leingi hjá innvolveraðu pørtunum, barnið, foreldrum, systkum og øðrum at bíða eftir hvør orsøkin er, til hví barnið er tikið, hvar barnð er, um barnið manglar nakað og um tað yvirhøvur hevur tað betur har tað er. Hetta arbeiði burdi ligið á øðrum parti enn bvt. Hetta arbeiði liggur heldur ikki undir løgfrøðið. Umráðandi er umgangandi at skipa millumlið til barn og foreldur. Hetta kann av góðum grundum ikki vera bvt, stovnsfakfólk ella fosturforeldur. Stk 5 og 6, burdi einans snúð seg um tá fakfólk fráboða og ikki at senda boð út til hvønn Hanus og Janus. Tað sigur seg sjálvt. Stk 7, vónandi verður § ikki einans vent móti barnafamiljum, men eisini móti fosturheimum og stovnum í skipan. Ein kann fáa hug at spyrja er hetta so eingin skal kunna flyta til onnur lond við sínum børnum fyri frið skyld? Vónandi verður dulnevnd fráboðan ikki loyvd. Við øðrum orðum, ikki at kunna standa við hvør ákærarin er. § er millum tær § sum verður mest brotin og burdi tí hinvegin verið herd. Minstamark má vera, at fakfólk sum treyt seta navn undir fráboðan. Sjálvandi. Tað er teirra starv,

júst sum dómarir, læknar ella onnur fakfólk. Òhugnaligt, um fakfólk sleppa at vera dulnevnd. Ein kann ikki vera ein vussur undir umstøðum, galdandi trygd hjá einum undir 23 ár, so burdi ein fingið sær aðra útbúgving, sum ikki leggur upp til at taka hond um hesi.

§19 1) 2) og 3) Vónandi er henda § sum heild ikki einans rætta móti barnafamiljum, men eisini fosturheimum og stovnum sum heild í skipan, herundir øll frítíðartilboð, dagstovna - eisini skúlar - tilboð og døgnstovnatilboð. Hetta burdi verið betur orða í lóg. 5) stk 2 burdi blivi greitt betur frá yvirfyri bvt. Hetta er nóg greitt, ella verður hetta tulka eftir hvør málsviðgeri er á málinum og metir út frá egnum førleika. Sjálvandi er tað sera óheppi. Stk 3, bvt siga sjálvi arbeiðsuppgávan er ov stór. Viðmælt er, at strika stk 3 ella seta annað enn bvt inn, tí henda uppfylgjan hendir ikki, sum nú er. Stk 4, hetta millumlið burdi verið serliga millum systkin, sum vera spjadd og missa hvønn annan í skipan, tó eisini foreldur og onnur, sum ynskja samband. Um sambandi ikki er direkta til barnið, men gjøgnum - av øllum pørtum góðtikið millumlið - burdi tryggleikin verið í hásæti. Stk 5 hetta kann einans setast í verk áðrenn foreldur missa myndugleika. Fyribyrgjandi arbeiði eftir §15 er eisini áðrenn burturføran og er ofta hetta orsøkin til, at foreldur seta seg í samband við bvt. Stk 5 er tí í hesum føri ikki neyðugt at seta inn, tí §15 sigur júst tað sama og um §15 skal setast í verk verður hetta tikið upp á fundi í samráð við bvn. Møguliga har manglar okkurt orð í stk 5 og møguliga hetta átti at orðast: bvn kann, við samtykki frá og í samstarvið við tann ella tey, ið HØVDU foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært §15, stk 1 í verk fyri BARNAFAMILJUNA, ímeðan barnið er burturført. (Tað kundi verið fantastiskt, at fingið familjuuppbyggjandi samrøður eftir ógvusligu burturtøkuna til dømis, fyri ikki at nevna skipaðan sorgarbólk). Annars er missurin systkin uppliva ikki nevndur og aldrin tikin hædd fyri. Heldur ikki er prógv fyri, um barnafamiljur við møguligum diagnosum nakrantíð fáa tað hjálp tey søkja bvt um.

Heldur ikki kann bvt vera tann sum bjóðar familjuráðgeving. Tað má onkur annar taka sær av, sum ikki er tilknýtt. Tað má vera trygt hjá familjum at opna seg á slíkum stað. Tann sami sum niðurbrýtur familjuna kann ikki byggja upp. Ein elektrikkari, sum brennur eitt hús niður, verður ikki tann sami sum leggur nýtt el inn. Àlitið á, at húsið ikki enn einaferð futtar av vegna ósketni er ikki tilstaðar. Tað ber ikki til, at seta bvn inn bæði at upploysa familjuna og at "veita hjálp og stuðul" aftaná. Tað er longu møguligt, men bvn tekur ikki av møguleikanum, umframt, tað er ikki ílagi yvirfyri famijunum, at tann, sum skræðir børn úr móðurørmum, er sami persónur, sum skal uppbyggja. Eingin krígsraktur vil at diktator bjóðar sálarfrøðisliga hjálp til tann ræðuleika, skaptur frammanundan av sama persóni. Kreppuhjálp verður ikki boðin í bvt, men tað tørva systkin, sum missa. Systkin sum missa á annan hátt, fáa hjálp frá Beranum og foreldur annars, fáa sorgarfarloyvi. Men ikki hesi. Munur er á fólkið?

"At bvn kann veita familjuni viðgerð, tá ið barnið er sett heiman, um tað verður mett at hava týdning fyri barnið, t.d. um familjan við familjuviðgerð kann betra um sínar liviumstøður soleiðis, at barnið kann koma heim aftur at búgva. Hetta er tað sum kann skrásetast undir falskar vónir. Hetta er tað skipanin ger minimum einaferð árliga og einki víðari hendir, burtursæð frá, upplivingin av vónini, sum verður sorla einaferð árliga. Tað er so óreint. Harumframt stendur í viðmerkingunum til §47 í bvlógini, at ein sjálvstøðug ætlan skal gerast fyri foreldrini, ímeðan barnið er sett heiman, og at fyriskipan skal setast í verk í mun til tann tørv, ið kanningin sambært §45 hevur lýst. Víðari stendur, at tá ið eitt barn verður sett heiman, er útgangsstøðið, at barnið skal heimaftur. Tískil er

umráðandi at arbeiða við familjuni í mun til hetta. Júst hvør fyriskipan eigur at verða sett í verk, má metast um við støði í kanningini eftir §45. Harumframt stendur, at tað sum eyðkennir fyriskipanirnar er, at tær antin eru ætlaðar at loysa trupulleikar, ella at fyrireika familjuna til, at barnið kemur heimaftur. Hetta er longu ein heimild, sum mett verður ikki er fylgd.

Hví skal bvt hava eftirlit við børnunum eftir tey eru umsorganaryvirtikin? Løgreglan kemur ikki og hyggur til nakran aftaná sakin er journalløgd, er ikki áløgd 2 ferð árliga at vitja heimi hjá skuldsetta, (her má sjálvandi nevnast at bvt heldur seg ikki til lógina ár aftaná ár við at vitja barn, heim ella geva kunning sum er krav í Føroya Rætti. Ein lækni kemur ikki heim og vitjar sjúklingin aftana sjúki er farin víðari til sálarfrøðing, fysioterapi ella annað sum játtast. Hjásitar, millumlið og stuðlar til familjuna mugu undir ongum umstøðum vera tengdir at bvt. Tað má haldast atskilt, tað sum er uppbyggjandi og tað sum skilur at. Sjálvandi. Hjásitar, millumlið og stuðlar burdu verið valdir av familjuni sjálvar á sama hátt, sum advokatar ofta eru valdir av einum sjálvum. Serliga til tey, sum fáa nokta samveru og eru skorin frá kunning og barnið í 23 ár.

Leggjast kann afturat, tá barnafamiljur syndrast uttan samtykki og millum annað "uttan samtykki" er mett at vera "ikki samstarvsinna" av bvt, verður tað longu skapa avstandur, væntandi kunning og minkandi samvera. Listin yvir "ikki samstarvsinna" er langur. Tað er heldur ikki lætt, tá avgerir takast yvir høvdið á einum, júst við tí umberingini, at ein ikki er samstarvsinnaður. Vísandi til omanfyrinevndu ásetingar í altjóða lóg vilja vit hinvegin mæla til, at farið verður fram við hóvsemi, so at nýggja heimildin ikki tekur grundarlagið undan barnafamiljunum. Tað vera sett børn heiman hvørja viku. Fleiri børn um vikuna. Tað passar ikki, at tað er brúkt sum seinasti útvegur. Børn vera tikin á føðideildini. Tað eru 7 dagar i eini viku, børnini vóru 5 tað einu vikuna, segði ein við innlit á tingsins røðarapalli. Práta verður eisini um, at gera átøk nógv fyrr og størri. Tað er sætt áður, at onkur er biðin setast í gongd og at eiga við keisaraskurð. Ì 2022 vóru 104 umsorganaryvirtøkur í alt. Talið fyri frívilligar burturtøkur er ikki nevnt.

"Fyriskipanir sambært §15, stk 1 kunnu einans setast í verk við samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Orsøkin til hetta er, at tað ikki kemur nakað burturúr at seta fyriskipanir í verk fyri foreldrini ímóti teirra vilja. Hetta má vera teirra egna val." Skipanin kann við øðrum orðum halda á fram at yppa øksl og skylda uppá ósamstarvsinna foreldur. Hví fær barnafamiljan ikki á sama hátt ætlannarskriv hvat bvt ætlar sær at arbeiða við, fyri at røkka málinum? Hvat um foreldrini áløgdu skipanini hvørji krøv vera sett skipan, at liva upp til á sama hátt? Hví ikki? Vend orðunum við, so útgangspunkti er ikki hvat barnafamiljan skal megna, men skipanin. Tað er lagt upp til, at børn vera send heimaftur við §15 sum heimild. Tað er ikki satt. Tað er stikk mótsætt. §15 verður brúkt fyri at vísa á, at foreldri dugur ikki. Sum heild er skipanin sera góð at skumpa bóltin millum sín, sum um eingin eigur og tí enda barnalagnur í ongamannalandi. So leingi børnini eru umsorganaryvirtikin, hevur bvt skyldu til og heimild í verandi lóggávu at arbeiða fyribyrgjandi, og at arbeiða fyri at barnið kann koma heimaftur. Sum fakfólk kenna vit eingi hagtøl fyri at hetta hendir. Heldur ikki er sæð ítøkilig dømir uppá júst hetta. Ættarlið eftir ættarlið. Tá mál eru rokkin koma børn heldur ikki heimaftur, hóast stovnar siga har er ikki meir at arbeiða við. Mælt verður til at nágreinað orðingina “í heilt serligum førum” tí mett verður, at bvt duga ikki at meta um, nær tað er skilagott at samstarva um/og ella flyta mál. Absolut eigur hetta ikki at liggja undir bvt.

§21 leikluturin ella parturin hjá bvn er í hesum føri sera sera ósjónligur, sum nú er. Er møguligt, at hetta hoyrur undir annað stað, óheft á allan hátt av bvt, men við foreldraráð og brúkaraumboð í samráð við upprunafamilju? Stk 2, hetta er tað, ið vanliga hendur. Havast skal samstundis í huga, at starvsfólk eru ofta ung, sum vilja forvinna pening við at arbeiða nakrar vaktir, ikki altíð eru útlærd ella hava betur førleika til uppgávuna, enn barnafamiljan, hóast fosturforeldur fáa okkurt skjótt skeið til tíðir. Stk 3, verileikin er, at tað ger bvn ikki, men hetta sum her er skriva, er jú partur av §21 sum ein sjálvfylgja. Verileikin er, at øll børn vit vita um, hava mist ikki bara systkin, vinfólk og familju. Umsorganaryvirtikin vit eru komin í samband við sum hjásiti hava eisini øll mist skúlagongdina. Vit viðmæla, sum útgangspunkt, at foreldramyndugleikin ikki verður mistur, hóast børn flyta heimanifrá. Tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá avvarandi, at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, millum annað tilknýti til bakland.

Hetta, at bvt flytur børn millum stovnar og viðgerð uttan at boða frá er púra púra vanligt, tó sera óbehagiligt og gevur ikki tryggleika ella svar. Trupult er at skilja uppskotið sum dupultorðar seg viðvíkjandi fyrisiting av læknaviðurskiftum og útbúgving. Sum heild kann nevnast, at óansæð um tað er uppgávan hjá bvt at flyta børn millum stovnar, hendir tað allíkavæl og tað hjálpur ikki, tá lógin er elastisk. Nágreinast má í lógini, hvar ein familja vendir sær, tá børn eru í kreppu og mistrivana vegna tað bvt leggur á hesi børn og familjur tess. Hjálp til heimi er eingin siðvenja frá bvt, heldur ikki, at bvt veitur tørv, stuðul og upplæring. Málsviðgevar vilja ikki skipa fyri til dømis hjálp til syskinasambandið og umbera hetta við, at lógin leggur ikki upp til tað. Ein og hvør veit, at lógin er minstamark fyri, hvussu nógva hjartaligheit, ein málsviðgeri velur at leggja í júst hetta við samveru millum systkin, so tey ikki missa hvønn annan burtur í ruðuleikanum. Ofta leggja málsviðgerar upp til alment at hjálpa foreldramyndugleika, men tað er verileikafjart.

Finnast prógv um, at bvt vil nøkrum tað besta ella er tað pátrúgv sum heild? Trupult er at vísa á hvar bvt vil børnum tað besta. Um so er vit øll kenna hvønn annan so væl í Føroyum, burdi tað nettup verið enn og lættari at givi røttu hjálpina. Tað er absolut ikki foreldraførleikin sum verður bøttur, men sáplaður niður, tað eru í hvussu er tað hjásitasamrøður snúgva seg mest um til tey sum ynskja sálarbót. Hevur nakar í trivnaðarnevndini nakrantíð mist barn til bvt? Verið til samrøðu við bvt? Verið hjásiti til barn í bvt?

Tosa verður eisini nógv um viðgerð, hvørjir viðgerastovnar eru til? Veit nakar? Vit kenna ongar, also, um ein hugsar fyri asperger ella aðrar viðføddar diagnosur. Burdi bvt ikki byrja við at fortalt foreldrum um børnini yvirhøvur eru á føroyskum ella útlendskum stovni? Um børnini eru á lívið aftaná sjálvmorðsroyndir, voldig álop á stovnum landsins, kynsliga misnýtslu og innleggingar á vaksindeild á sálarligum deplum og innisperra uttan fráboðan? Tað vera ikki sett somu krøv til bvt um hvussu børnini búgva ella hvussu tey hava tað, sum til barnafamiljur, hví? Tá børn vera sett heiman er ikki altíð ein orsøk til tess. Hetta avoldaða dømi um, at børn vera umsorganaryvirtikin, tí foreldur ikki megna, er ikki og hevur ikki verið haldbært. Familjurnar eru ressursusterkar familjur. Familjur vera ikki sæddar ella tulkaðar á sama hátt av bvt. Tann, sum hevur borði barnið og veri um barnið øll barnins ár, hevur vitan, sum eingin annar hevur. Tað vitan sleppur ein ikki at partsamrøða um. Tað er altíð sunt tá onnur eygu eru á eitt mál, tí er sera umráðandi, at bvt sleppur, aftaná eina burturføran.

Skal barnið ella tann ungi hava týðandi og avgerandi læknaviðgerð ella læknainntriv, sum foreldramyndugleikin er ósamdur í, krevur hetta, at bvn tekur eina grundgivna fyrisitingarliga avgerð um hesi viðurskifti eftir §21, stk 3. Bvn kann t.d. taka avgerð um at seta í verk eina læknaliga kanning og/ella viðgerð av barninum, sum krevur innlegging á sjúkrahúsi, bæði á somatiskari og psykiatriskari deild. - Hesa avgerð tekur bvt í forvegin, tó kundi verið ynskiligt, tá bvt innskrivar barnið til hesar viðgerir ella stovnskift allatíð, at tey góvu familjuni lógarkravdu kunning. Hetta, sum minstamark. Tað ger bvt ikki. Heldur ikki tekur bvt atlit til barnsins menning.

§42 Stk 2 4) er ofta brotin og koma mong skrivlig prógv inn, um júst hetta. §42, stk. 2, nr. 5 í bvlóg verður strikað grundað á, at ásetingin verður mett óneyðug í sambandi við at skriva eina gerðabók um fundirnar hjá bvn. Sjálvandi er § neyðug og sera týdningarmikil og burdi ikki verið strika! Sjálvandi skal nakað so týdningarmikið sum tagnaðarskylda vera nevnd. Umframt, at tað skal sjálvandi gerast møguligt, at fáa innlit til gerðabók, tá brúkari tekur skipan í Føroya Rætt um egin viðurskifti. Tað er ikki møguligt sum nú er. Hvør situr í bvn? Læknaligt sertoymi? Psykiatari? Sálarfrøðingur? Hví er mett, at bvn kennur máli best, hevur allar síður og greinir í málinum? Hví sleppa hesi at taka læknaligar og sálarligar metingar uttan rætta førleika?

§58 viðmælt er, at fáa loyvi til, at skifta málsviðgera, tá málsviðgeri skrivliga metir seg ikki kunna samstarva. Samstarvskorti verður altíð brúkt negativt móti barnafamiljuni. Stk 4 hetta uppskot er longu orða í somu §. Ynskiligt er at fáa upplýst hvørjar treytir skulu leggjast til grund fyri slíka avgerð. Um bvt metir brúkarin ikki er samstarvsinnaður, kann brúkarin velja, at royna aðrastaðni. Hetta kann tó ikki vera, sum nú, upp til bvt/n at avgera. Legg ikki avgerðarrættin til umsiting sjálvi at meta um. Lat ikki hetta vera tengt at bvt. Um felags foreldramyndugleiki er og annað foreldri noktar, plagar bvt at tosa við foreldri sum er lættast at yvirtala. Um øll nokta, barn og bæði foreldur, verður tað allíkavæl, sum bvt krevur. Ynski hjá pørtum í málinum, er ikki tað, tað snýr seg um. Kenslan av, at missa allan avgerarrætt, hóast ein megnar foreldraførleikakanning er øgilig. Foreldur kunnu knappliga als ikki takast við uppá ráð. Tað er at fara illa við familjuni. Tað skapar ikki kenslu av, at bvt leggur upp til samstarv ella er samstarvsinna. Tað er loyvt barnafamiljum at søkja um, skift av málsviðgera, um mett er, at málið ikki kann røkkast. Tað er tó loyvt bvt at nokta fyri hesum. Tað burdi ikki verði so.

"Vandi kann verða fyri, at mál koma at skifta runt millum bvt, tá borgarin er ónøgdur, til dømis, hvør rindar fyri málið." Skelkandi niðurgerandi orðing, sum ikki sær førleikar hjá menniskjanum yvirum borðið. Annars hevur bvt rætt til, at játta avokat áðrenn umsorganaryvirtøka verður framd. Sum heild er heitið ikki sett á, hvørja hjálp ein setur inn. Foreldur eru ikki ímóti. Tað er ikki satt, at foreldur ikki samstarva. Hinvegin kemur ofta fyri, at bvt ikki samstarvar við barnafamilju. Samvera er nevnd. Samvera verður einans góðkend, um tað kann brúkast til fyrimun hjá bvt. Ì mun til Familjufyrisiting, har útgangspunkti er, at samvera nærum aldrin kann noktast, verður samvera ofta nokta og í øllum føri altíð minka burt í einki, tá børn eru undir bvt.

"Hetta hóast foreldramynduleiki er ósamd við bvt". Orða tað hinvegin: hetta hóast bvt ikki ynskir at samstarva við barn, foreldur ella bakland ella er ósamd við foreldur. "Í ávísum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við bvt, ella foreldramyndugleikin er ímóti ella ikki samdur

við bvt um ávís persónlig viðurskifti" kann umskrivast: Í ávísum førum ynskir skipanin ikki at samstarva við barnafamiljuna, ella skipanin er ímóti ella ikki samd við barnafamiljuna um ávís persónlig viðurskifti. Sum hjásiti kenna vit eingi foreldur, sum ikki vilja samstarva, um tey fáa samstarv boði. Ì allarflestu førum fær eingin samstarv boði og allar avgerir vera tiknar yvir høvdið á einum. Langt áðrenn umsorganaryvirtøku. Er tað ikki vanlig foreldraførleikaevni, at standa upp fyri børn og er tað ikki vanlig menniskjarættindi, at gera vart við, um onkur roynur at skumpa ein út av eggini?

"Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin ikki er førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð um ítøkiligu støðuna hjá barninum vegna sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Harumframt kann hugsast, at foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki er tætt knýttur at barninum av ymiskum orsøkum, ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum." Òtrúliga ófantaligt at siga um onnur og ikki serliga uppbyggjandi, stuðlandi, samstarvsinna ella hjálpsamt orða. Vend settninginum móti skipanini sjálvari og so fæst sanna myndin av hví ættarlið eftir ættarlið ikki koma burturúr sosiala arvinum: støðan kann eisini verða tann, at skipanin ikki er før fyri at taka eina væl grundaða avgerð um ítøkiligu støðuna hjá barninum vegna sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Harumframt kann hugsast, at skipanin í ávísum førum ikki er tætt knýtt at barninum av ymiskum orsøkum, ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum.

§65 Kærumøguleika tíðarfreistin burdi verið tikin heilt burtur, tí barnafamiljan tørvar nógv longur tíð, enn 4 vikur at koma fyri seg. Skelkurin, angistin og sorgin gerast fylgisveinar ár aftaná ár aftaná ár og tí er sera umráðandi, at taka ímóti barnafamiljuni, við teim fáu rættindum hesi hava, tá tey hava orkuð mitt í allari strongdini yvir álopið. Heldur ikki gevur settningurin meining, um §39 ikki verður nevnd her. §39 er sera umráðandi og hendur ofta í samband við umsorganaryvirtøku. Stk 3 sjálvandi eigur at vera loyvt at kæra avgerir, altíð. Við hesum leggur BUMR upp til, at eitt barn yvir 15 ár kann velja at fara einsamalt í Føroya Rætt, uttan sítt bakland ella hjásita, móti bvt ella fks, meðan tað er fanga í eini skipan, barnið bæði skal práta regluliga við ífylgi lóg og vera sett at búgva hjá. Møguliga á fremmandum stað, fremmandari bygd/býi, fremmandum skúla og uttan millumlið til familju. Hetta hóast børn sjáldan vera mett aldursvarandi av bvt. Ivingarsamt er, hvussu umsorganarfult tað er? Møguliga mannagongdir eru ikki nóg greiðar, tær eru ikki eksisterandi í tí sum hendir. Barnafamiljan fær ikki ein manual heim við. Hví kann bvt ikki koma við faldarum yvir tænastur á sama hátt sum faldarir og heimasíða hjá Familjufyrisiting?

Vit mugu hava barnafamiljuna í fokus og hetta, at tosa við skipan sum ikki hjálpur, kunnu vit ikki útseta nakran fyri longur. Gev familjunum eitt stað, har tey føla seg hoyrd OG lurta eftir á ein góðtakandi hátt. Núverandi skipanir eru óbrúkiligar til slíkt. Stovna eitt nýtt forum til hesi, við møguleika fyri hjásita, sorgarbólk, brúkaraumboð og foreldraráð á sama hátt sum eldra og ungdómsráð eru. Uppskotið vísur ikki greitt á, hvat kann gerast við tá bvt seta seg upp ímóti fyriskipanum, kravdar av Føroya Rætti.

Sambært bvlóg verður bvøkið umsitið av staðbundnum kommunalum bvt. Bvmál verða umsitin alt eftir, hvar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva. Tað er ikki soleiðis tað fungerar í

praksis. Sannleikin er, at skrásettur/ikki skrásettur bústaður í Føroyum ella aðrastaðni, verður ikki brúkt sum metingargrundarlag útfrá hvør bvt tekur málið.

"Ikki mett, at broytingin fer at ávirka arbeiðsorkuna hjá nøkrum myndugleika," hetta er ikki satt. Àvirkanin er stór í familjuni/foreldramyndugleika, um hjálpin, ein biður um, ikki kemur. Eisini kemur hetta fíggjarliga at vera stórur smeitur, bæði um tað aftaná skal lappast uppá við heiligvág, sálarfrøðisligari hjálp, umframt fyritíðarpensjón og annað, sum má setast inn, tá børn vera sleppt av bvt. Avleiðingar eru ofta nevnd í hagtølum. Sum oftast er skipanin lagnutung, at koma í samband við fyri góðtrúgvin børn. Hesi børn gerast heimleys, arbeiðsleys, uttan útbúgving og sjálvmorðsøkjandi. Umframt tey missa alt samband við bakland. Um so er, hesi yvirliva at vera burturførd, enda ættarlið eftir ættarlið í somu støðu. Um skipanin var vælvirkandi, burdi hetta kunna steðgast. Hetta vísa seinastu hagtølini frá sosialráðgevum í Føroyum, um føroysk viðurskiftini. Tað er ikki skipanin, sum tørvar hjálp, tað er barnafamiljurnar. Tó eigur at verða hugsað um, hvørji av hesum viðurskiftum barnafamiljan við fyrimuni kann fáa ávirkan á, soleiðis at viðkomandi framvegis hevur ávirkan á lívið hjá barninum og kennir seg sum part at barninum.

Ger ein seg inn á Barnarættindasáttmalan tá ein sigur bvt skal avgera ella kolldøma børn og barnsins persónligu viðurskifti? Ì summum førum kann ivi verða um, nær talan er um tílík persónlig viðurskifti hjá barninum, sum bvn skal taka fyrisitingarliga avgerð um, og nær talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi, ið avgerð ikki skal takast um. Tað avgerandi er, at talan er um persónlig viðurskifti hjá barninum, sum hava ovurstóran og víðfevndan týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, og sum foreldramyndugleikin er ósamdur við bvt um. Vil viðmæla at fáa greiðu á hesum og nágreina hetta so als eingin ivi er um. Til dømis, sera grovur harðskapur, dømdur av Føroya Rætti og samstundis havast í hug, at eisini hesi menniskju hava rættindi og at barnið tørvar eitt ávíst, tó trygt, tilknýti, í ávísan mun, til hesi, sum fedranna upphav og fyri at kunna vera heil menniskju, uttan at mangla ein part av sær sjálvum.

"Eftir galdandi lóggávu er ikki heimild hjá bvn at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum, um foreldramyndugleikin er ímóti avgerðini og ikki vil geva samtykki, heldur ikki sjálvt um barnið ynskir avgerðina. Tí er tað týdningarmikið, at bvn hevur heimild til at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti í lívinum hjá barninum, sum er til barnsins besta." Hetta er lygn. Tað er ikki satt, at foreldramyndugleiki verður spurdur ella skal vera samdur. Òsatt er eisini "Um nakar fær kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi." Nevnast má í lógini hvat fakfólk gera í samband við, at børn vera kynsliga misnýtt, gerast við barn, velja at heingja seg á stovnum landsins og tá kunningin til foreldrini er væntandi og hesi ikki so mikið sum vita, um barnið er í Føroyum, útlandinum og heldur ikki vera tryggja, at barnið er enn á lívið. Ikki bara fáa foreldrini eina rokning, børnini gjalda eisini húsaleigu fyri at búgva á stovnið bvt setur tey á av teim lítlu lummapengum tey fáa.

At missa eitt systkin og ikki hava rættin til at søkja samveru, at leggja seg at sova hvørja nátt og ikki vita hvar barnið er, at ynskja samband og ikki fáa tað. At síggja sítt yngra systkin vera skrætt úr móðurørmum av løgreglu og bvt, sum bróta seg inn og leita, til tey finna barnið. Tað er einki annað, enn revsing, fyrisitingarlig sekt og eitt gigantiskt inntriv í privatifrið rundan um eina familju, sum friðarliga sita rundan um familjuborðið. Soleiðis er í forvegin, so, at fara enn og longur, enn og

størri inntriv, so sum henda lóg leggur upp til, eru vit enn innanfyri ST sáttmálan? Hetta grundað á, at tað hevur stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá barnafamiljuni at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, sum er til barnsins besta. At sleppa, at geva eina føðingardagsgávu til barnið til dømis. Slíkt er jú nokta sum nú er.

Vit loyva okkum at ivast í, um tað, at flyta málið er loysnin, um málsviðgerin heldur áfram at vera niðurgerandi. Ofta flytur trupulleikin við. Orðingin í skrivið ber eisini brá av, hvussu barnafamiljur vera møttar. Tað burdi staði týðuliga í lógini, at tað er lógarkrav, at møta menniskjum har tey eru og við tí tilfeingi tey hava. Tað letur tó til, at júst tað uppgávuna kann skipanin hava trupult at átaka sær. Also, at síggja menniskja við førleikum og at fáa hesir fram positivt, ístaðinfyri negativt og ákærandi. Hetta skriv leggur upp til, at tosa verður einans um barnafamiljur, sum ikki eru samstarvsinnaðar - sum um nakar hevur eitt val um samstarv, í støðuni børn og vaksin vera sett í. Tað er møguligt, at orða seg ørvísi, at síggja barnafamiljur við sunnum sjónarmið, yvirfyri tí barnafamiljur týðuliga vera boðin. Tað sera sjáldan vanliga, at menniskju eru fullkomiliga hopleys.

"Ikki verður misnýtt av foreldrum, at skáka sær undan trupulleikum, so, at barnið ikki fær tað bestu hjálp og stuðul, tað hevur krav um." Heldur ikki má uppskotið vera misnýtt av skipan so ein annar málsviðgeri skal rudda upp. Tað má ansast eftir, at barnafamiljan ikki fær uppliving av, at vera vavd inn í somu greipu, men at veriliga merkja, hetta kann hjálpa og muna á tryggan og umfevnandi hátt. Sjálvandi kunnu øll boða myndugleikum í øðrum londum frá. Tað stendur í lógini, at fráboðanarskyldan er galdandi ein og hvønn. Framkomin lond hava slíkan fráboðanarmøguleika.

Um barnafamiljan hevði fingið røttu hjálp, tá barnið býr við hús, høvdu ongar tvingsilstøkur verið. Tó sigur bvt um og umaftur orðarætt, at tað er einans um foreldrini geva umsorganina til skipanina, at barnafamiljan kann hjálpast av skipan. Tá ein biður um at fáa orðini skrivliga, verður tað nokta. Mongu umsorganaryvirtøkurnar vísa eingi dømir um, at nakar verður hjálptur betur tá. Tað gongur ikki út uppá at hyggja eftir foreldraførleika. Tá barni er tikið, er tað vekk og upprunaheimi slept.

"Avvarðandi bvt er tí uttan iva best skikkað til at meta um, um tað er neyðugt og ráðiligt fyri barnið og familjuna at flyta málið til eina aðra bvn at umsita. Mett verður ikki, at aðrir fyrisitingarligir myndugleikar kunnu gera somu meting við fyriliti til øll sjónarmið í málinum, av tí at teir ikki hava sama nágreina innlit í málið, á sama hátt sum avvarðandi bvn hevur, og kunnu tískil ikki gera eina grundaða meting av, hvat er best fyri barnið, foreldrini og aðrar partar í málum." Tað er ikki altíð málsviðgerið kennur barnafamilju, avgerð er tikin um. Málsviðgeri kann vera nýggjur á málið viðkomandi skal taka álvarsama støðu til. Tað er avgjørt ikki altíð, nýggi málsviðgeri finnur orsøk í tí fyrrverandi málsviðgeri orðar, sum orsøk fyri burturføran. Uppskotið gevur almennum myndugleikum atgongd til privata ogn. Tað hava hesir í forvegin. Um tað snýr seg um at verja barnið sum mest, er loysnin at halda tað burtur frá bvt.

Hetta uppskot tryggjar ikki barnafamiljum rættin at fáa upplýst, um barnið er í Danmark ella aðrastaðni. Tað er sera ótrygg kensla. Dugi ikki at lesa hvar í uppskotinum barnafamiljan verður stuðla. Lesi hinvegin allar broytingar peika til fyrimuns fyri skipansins heimild. Tað stuðlar avgjørt ikki barnafamiljum, hóast tað er heitið á uppskotið.

Afturvendandi kemur prátið inn á, um loysn kundu eitt nú verið at bvt kring landið verða býttar í størri eindir og brúka uttanhýsis fakligar ráðgevar. Vit meta, skipanin er longu sett í størri eindir og hevur longu sera kostnaðarmiklar uttanfyristandandi inni at meta um, so tað er ikki hesin parturin sum væntar í. Foreldrakanningar og úttgreiningarmøguleikar hjá innkallaðum sálarfrøðisligum serkønum eru strongdarfullar og skulu hurrast ígjøgnum. Við tvingsli og áleggjan. Tað er ikki frívilligt. "Heilt serligar umstøður eru t.d.tá eitt bvmál hevur koyrt í fleiri ár hjá somu bvt, har ið samskiftið og samstarvið millum foreldrini og bvt er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu." Hvat um tað einans snýr seg um annan partin? Ofta er tað einans bvt sum leggur upp til, at samstarvið er vánaligt, men noktar tó fyri, at loysa trupulleikan ella betra um viðurskiftini hesum viðvíkjandi. Sum nú er, kann ein søkja søkja um hetta, og hetta verður einans nokta - av bvt. So hvør skal taka avgerð um hetta? FKS? Tað er roynt. LUM? Tað er roynt. Hetta kann ikki áleggjast bvn at taka sær av. Tað kemur ikki at broyta støðuna, so sum støðan er í forvegin. Vit mugu síggja realistiskt uppá hetta. Tað er so ótrúliga nógv, sum ikki ber til tá ein møtir skipanini. "Nýggja bvn metir ikki um málið av nýggjum, men heldur áfram har fyrrverandi bvt slepti. " Hetta gevur onga meining og kemur á ongan hátt at muna.

"Metir avvarðandi bvn ikki, at tað av ymiskum orsøkum (t.d. atlit til barnið) er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt mál til eina aðra bvn at umsita, er henda metingin endalig, og kann ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika at taka støðu til." Allar hesar hurðarnar, sum latast aftur og aftur og allir hesir møguleikarnir barnafamiljan roynir og sum ikki bera til. Hetta blívur bara til enn eitt slag undir vangan fyri barnafamiljurnar. Tað kostar óendaliga kreftir, at reisa seg aftur hvørja ferð eitt avslag kemur sendandi sum ein vátur vøttur. Vit vilja staðiliga ávara um hesa ásetan og bøna um, at hetta verður týðuliga orða til nógv betur fyrimuns fyri barnafamiljuna. Undrunarsamt er, at partar av fyrisitingarlóg og servicelov, sum umhandla foreldur, ikki er nevnt, eftirsum hetta uppskot er ætla sum stuðul til barnafamiljur.

Handa eina kaffidagin, har tað skal eitast at vera eftirlit eftirletur 364 aðrir dagar árliga í 23 ár at mishalda og oyðileggja eitt meinniskja og ífylgi skipan kemur einki í rættlag allíkavæl aftaná eftirlit. Gott er um BUMR kann fella niður allar siðvenjur, sum eru ósunt skaptar í skipan. Verður sagt á røðarapalli, at ein skal næstan vera fakfólk fyri at kunna greiða frá og skilja, well, eg bjóði meg hervið enn einaferð fram, at greiða frá tí eg veit. Eg eri fakfólk, bleiv millum annað útlærdur námsfrøðingur fyri umleið 32 árum síðani. Bæði áðrenn og aftaná eg bleiv útlærd arbeiddi eg innan ymisk sløg av døgnstovnum, bæði í útlandi og Føroyum. Allar uppgávur eg skrivaði í lærutið snúðu seg um sertørv útfrá tí vit lærdu um normaltørv. Mín prógvtøkuuppgáva var umsorganarsvíkjan, umframt eg havi lærdóm frá JanusCenteret innan kynsligan harskap, eri við í nevndini fyri Verji Børnini, sum umsita Steðga Pedofili í Føroyum, annars havi eg tikið ymisk lógarskeið. Eg havi arbeitt millum annað á barnadeild, kvinnuhúsi og heimum fyri psykopatar/karakteravvíkjarir. Eg havi orku og royndir, at lesa lógartekst, umframt tað er partur av útbúgving. Eg havi gjørt vart við upp í saman, ynskt at koma við hoyringssvar, viðmerkingum, vera partur av fundum um økið og at koma inn at vera hoyrd. Eg vil sera fegin koma í arbeiðsbólk. Eg vil hervið enn einaferð bjóða meg fram at hjálpa við hesi uppruddan.

Tær kærastu heilsanir, við vón um samstarv

Sólmai, umboð fyri 120.